UTTAN ÚR HEIMI

## Orðalagið harðnar

Bílig klæðir úr Kina eru vorðin ein sonn plága fyri klædnaídnaðin í ES og USA, sum nú hótta við tiltøkum fyri at avmarka innflutningin úr Kina.

Serliga tann amerikanska stjórnin ilskast inn á tey bíligu kinesisku klæðini, og nú vil stjórnin vera við, at kinesisku myndugleikarnir hava hildið virðinum á landsins gjaldoyra, yeninum, niðri fyri at økja um útflutningin. Sambært Financial Times hava embætismenn hjá amerikanska fíggjarmálaráðnum kravt, at Kina skal skriva virðið á gjaldoyranum minst 10 prosent upp. Ger stjórnin í Beijing ikki tað, fer Kongressin í Washington at umhugsa at seta handilstiltøk í verk ímóti Kina, skrivar blaðið.

Kinesiska stjórnin hevur sagt, at hon umhugsar at leggja eitt ávíst avgjald á klæðir, sum verða útflutt, men nú sigur hon, at seta amerikanarar tiltøk í verk, verður ætlanin um avgjaldið slept. ES vil ikki fara so harðliga fram sum USA, men roynir ístaðin fyri at fáa eina diplomatiska loysn fyri at sleppa undan handilskríggi við Kina.

## Lítil áhugi

Hóast svenska stjórnin hevði boðið uttanríkisráðharrunum í 46 londum á fund í evroatlantiska samstarvsráðnum hjá NATO, komu bara 15 ráðharrar á fundin, sum var í býnum Åre fyrradagin og í gjár.

Har var eingin Condolleezza Rice úr USA, sum ístaðin fyri var umboðað av varamanni hennara, Nicholas Burns. Har var heldur eingin Jack Straw úr Bretlandi og heldur eingin Joschka Fischer úr Týsklandi. Frakland, Spania, Danmark og Finnland sendu heldur ikki sínar uttanríkisráðharrar til Åre, men norski uttanríkisráðharrin, Jan Petersen, var har.

Svenska stjórnin hevði annars lagt stóran dent á fundin í Åre, og tiltakið kostaði heldur ikki so lítið. Sambært tíðindastovuni TT vóru trygdartiltøkini sera strong, og løgreglan var sera væl umboðað í Åre, sum er eitt av teimum best umtóktu støðunum í Svøríki til vetrarítrótt.

## Færri morð

Morð eru gerandiskostur í teimum brasilsku stórbýunum, og í Rio de Janeiro siga myndugleikarnir, at tey nógvu morðini eru tann størsti trupulleikin, sum teir hava at dragast við.

Men í býnum Sao Paulo og har um vegir gongur tað tann rætta vegin. Tøl hjá UNESCO vísa, at í 1999 vóru 44,1 morð fyri hvørjar 100.000 íbúgvar í økinum, men í 2003 var talið komið niður í 35,9. Hetta er kanska ein uggi, men samstundis vísir tað seg, at talið á teimum, sum verða skotin, var størri í 2003 enn í 1999. UNESCO heldur, at morðini í Sao Pauloøkinum eru fækkað, tí at løgreglan er betur mannað nú enn fyrr, og at fleiri tiltøk hjá tí almenna hava fingið ungfólk at halda seg burturi frá kriminaliteti.

Umleið 182 milliónir fólk búgva í Brasil, og av teimum búgva umleið 40 milliónir í Sao Pauloøkinum.

## Goysir aftur

Eitt gosfjall, sum meksikanar vanliga rópa Eldgosfjallið, er farið at gera vart við, eftir at tað hevur ligið í dvala í trý ár.

Mánadagin sendi gosfjallið royk og øsku einar fýra kilometrar upp í loft. Fjallið er einar 500 kilometrar frá høvuðsstaðnum Meksiko City, men har býr lítið fólk, skrivar AP. Myndugleikarnir hava kortini gjørt av at halda eyga við fjallinum, tí heldur gosið fram, kann tað gerast neyðugt at flyta fólkið úr nøkrum bygdum, sum eru nærhendis fjallinum.

Seinast Eldgosfjallið av álvara gjørdi vart við seg var í 1913 , men meksikanskir jarðfrøðingar siga, at teir hava skrásett virksemi inni í fjallinum fleiri ferðir. Fyri trimum árum síðani goysti fjallið nakrar dagar, og tá máttu myndugleikarnir flyta fólk úr bygdunum har nærhendis.

# Siga al-Zarqawi vera særdan

**Viðhaldsmenninir hjá yvirgangsleiðaranum Abu Musab al-Zarqawi siga, at hann er særdur. Tað kann vera ein fráboðan um eitt stórálop**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Abu Musab al-Zarqawi. Tíðindini um, at hann er særdur, kunnu vera sonn, men tey kunnu eisini vera ein fráboðan um, at felagsskapur hansara fyrireikar eitt stórálop*

Mynd: Reuters

– Fólk Islams! Tit skulu biðja fyri heilaga stríðsmanninum Abu Musab al-Zarqawi, so hann verður lektur fyri skaðan, sum hann fekk í stríði Guðs. Tí hann er okkara fremsti stríðsmaður, og vit biðja Guð lekja hann, so hann kann halda fram við bardaganum.

Boðini stóðu á heimasíðuni hjá felagsskapinum hjá Abu Musab al-Zarqawi í gjár, men ongar aðrar keldur kundu vátta tíðindini um, at hann er særdur. Men summar keldur halda, at tíðindini eru bein.

– Ja, tað haldi eg, og eg verði ikki kløkkur, um vit um nakrar fáar dagar fáa at vita, at hann hevur liðið píslaváttardeyðan, sigur David Claridge, Miðeystursérfrøðingur á einum granskingarstovni í London, við Reuters.

### Ávaring um stórálop

Amerikanskir talsmenn søgdu í gjár, at teir hava ongar upplýsingar um al-Zarqawi. Steve Boylan, sum er talsmaður hjá herleiðsuni í Washington, segði, at eingin kann siga við vissu, um tíðindini eru bein, tí tað er vónleyst at fáa prógv fyri tí. USA hevur leingið lagt hann undir at vera høvuðsmannin aftan fyri ófriðin í Irak, og amerikanska stjórnin hevur lovað næstan 150 milliónir krónur í finningarløn, verður hann avdúkaður og tikin.

Kendi yvirgangsserfrøðingurin Magnus Ranstorp, ið arbeiðir á lærda St. Andrews háskúlanum í Skotlandi, setir spurnartekin við, hví felagsskapurin hjá al-Zarqawi boðar frá, at hann er særdur.

– Hetta var vera ein roynd at sissa amerikonsku og iraksku myndugleikarnar, so felagsskapurin fær stundir til at fyrireika eitt ella annað stórálop, sigur Magnus Ranstorp við Reuters.

### Onkur tekur við

Abu Musab al-Zarqawi, sum er ættaður úr Jordan, hevur tætt tilknýti til felagsskapin al-Qaeda hjá Osama bin Laden, og serfrøðingar halda, at tað fer ikki at standa á at finna ein, sum kann taka við eftir al-Zarqawi, skuldi hann doyð.

Faris bin Houzam, sum hevur kannað al-Qaeda í fleiri ár, sigur við Reuters, at al-Qaeda hevur fleiri limir í Saudiarabia, sum eru til reiðar at taka við. Teir hava kanska ikki somu royndir sum hann, men tað er einki at ivast í, at teir eru til reiðar at halda fram við virksemi hansara, sigur hann.

# Sætta hvønn tíma verður ein kvinna myrd

**Í Suðurafrika verða fýra kvinnur myrdar hvørt einasta samdøgur árið runt, men minni enn helmingurin av drápsmonnunum verða dømdir**

MORÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Suðurafrika hevur framvegis stórar sosialar trupulleikar, og ein nýggk frágreiðing vísir, at tað eru serliga kvinnurnar, sum eru tapararnir.

Kanningin vísir, at í 1999 vórðu 1.349 kvinnur myrdar í Suðurafrika, men talsmaðurin hjá nevndini, sum hevur gjørt kanningina, sigur við CNN, at talið er uttan iva tað sama í dag.

– Sætta hvønn tíma verður ein kvinna myrd, og í flestu førum er tað maðurin ella sambúgvin, sum er drápsmaðurin. Umroknað eftir fólkatali mrkir tað, at 8,8 av hvøårjum 100.000 kvinnum verða myrdar, og tað er tað størsta talið, sum vit vita um í heiminum, stendur í frágreiðingini.

Verða tølini kannað nærri, sæst, at nógv tær flestu kvinnurnar, sum verða myrdar, eru svartar, og kanningin staðfestir, at minni enn 40 prosent av drápsmonnunum fáa dóm fyri sítt brotsverk. Orsøkin er millum annað vánaligt løgregluarbeiði, og haraftturat vísir tað seg, at í fleiri førum verða drápsmálini als ikki ella illa kannað.

Granskararnir, sum hava gjørt kanningina, siga við Reuters, at rúsdrekkamisnýtsla og alt ov løtt atgongd til skotvápn eru ein trupulleiki í teimum stóru býunum, men at arbeiðsloysi og sosialur ójavni eru medvirkandi til morð og harðskap ímóti kvinnunum.